
Skimast tú eftir summarstarvi?
starv.fo

# Innihald


**AT SØKJA SUMMARSTARV**
Fyrimunir
Hvat vil eg
Tak sjálv/ur stig
Hvar finni eg summarstarvið

**STARV.FO**
Hvat er starv.fo
Soleiðis skráseti eg meg
Starvslýsingar
CV

**FYRIREIKING**
Umsókn
Samrøða

**RÆTTINDI, ARBEIÐSTÍÐIR OG LØN**
Rættindi
Arbeiðstíðir og løn

**YRKISLEIÐIN**
Summarstarv – vegurin upp
Ung um summarstørv
Ger tað! sigur Elin í Stórustovu


## STARV.FO – TÍN SLÓÐ TIL SUMMARSTARVIÐ

Hesin faldari er til tín, ið ætlar at royna teg í summarstarvi, ella vil vita, hvat eitt summarstarv er. Her sært tú, hvussu tú stig fyri stig kanst finna og søkja starv, skriva umsókn, og hvat tú kanst fáa burtur úr at arbeiða í summarfrítíðini.

Góða eydnu við summarstarvinum!




# AT SØKJA SUMMARSTARV

## FYRIMUNIR

Summarstørv eru tíðaravmarkað størv. Summarstørv eru fyri ung, ið vilja brúka summarfrítíðina til at arbeiða. Tú kanst fáa nýggjar vinir og knýta sambond við fólk. Tú vinnur tær sjálvandi eisini pening.

**Tú kanst:**

- ✓ vinna **førleikar***, sum tú kanst brúka bæði nú og seinni
- ✓ læra at samstarva
- ✓ knýta sambond við arbeiðspláss
- ✓ fáa møguleika fyri at fáa starv ella starvsvenjing seinni



# AT SØKJA SUMMARSTARV

## HVAT VIL EG

Áðrenn tú søkir, er tað gott at hugsa: hvat vil eg, hvat ætli eg, og hvat vænti eg av summarstarvinum. Ein háttur at finna út av, hvat tú vilt, kann vera ein hugastormur. Finn tær ein seðil og skriva niður alt, ið tú hugsar.

**Hetta kann vera:**

- ✓ Hvat dugi eg?
- ✓ Hvørji ynski havi eg í mun til summarstarvið?
- ✓ Hvørjar dreymar havi eg?
- ✓ Hvørjum vil eg arbeiða við?
- ✓ Hvat vil eg hava burtur úr summarstarvinum?
- ✓ Hvat hevði verið snilt í mun til eitt framtíðarstarv?



# AT SØKJA SUMMARSTARV

## TAK SJÁLV/UR STIG

Eitt gott hugskot er, sjálv/ur at taka nøkur stig. Hetta kann t.d. vera at ringja til fyritøkur og spyrja, um tey hava eitt summarstarv til tín.

Sig við fólk, at tú leitar eftir summarstarvi. Ver ágrýtin og spyr tey, tú kennir, um tey vita um nakað summarstarv. Ein annar møguleiki er at senda eina óboðna umsókn til onkra fyritøku.

Um tú tekur fyrsta stigið sjálv/ur, kann tað vera lættari at finna summarstarvið. Tí tað er ikki altíð, at fyritøkur søkja eftir fólki, hóast teimum tørvar avloysarar. Tá ung finna sær summarstarv, verða størvini í flestu førum sett uttan at hava verið lýst leys í fjølmiðlunum.



# AT SØKJA SUMMARSTARV

## HVAR FINNI EG SUMMARSTARVIÐ

Tínir møguleikar at finna summarstarv økjast í mun til tann innsats tú sjálv/ur ger. Jú fleiri støð tú spyr teg fyri, jú størri møguleika hevur tú at finna eitt starv. Tað er týðandi, at tú heldur á við at leita, hóast tú fært nei frá onkrum.

Tað eru nógv ymisk summarstørv at finna, men tað eru nakrar fyritøkur/stovnar, sum serliga hava brúk fyri avloysarum um summarið. Nøkur av hesum eru:

- ✓ Handlar
- ✓ Matstovur og kaféir
- ✓ Flakavirkir
- ✓ Kommunur
- ✓ Hotell



# Starv.fo

## HVAT ER STARV.FO

Ein góður máti at finna summarstarvið er at trýsta teg inn á **www.starv.fo.**

Starv.fo er ein heimasíða fyri arbeiðsgevarar og starvssøkjandi, sum leita eftir hvørjum øðrum. Her finnur tú nógv ymisk størv. Starv.fo hevur nógv vitjandi hvønn dag, og nógv fólk hava funnið starv gjøgnum heimasíðuna.

**Á starv.fo kanst tú:**

- ✓ Síggja leys summarstørv
- ✓ Skráseta teg sum brúkari av starv.fo
- ✓ Leggja títt CV inn, so arbeiðsgevarar kunnu síggja, at tú ert tøk/ur



# Starv.fo

## SOLEIÐIS SKRÁSETI EG MEG

Tú kanst altíð síggja summarstørv á síðuni, men um tú ynskir, at arbeiðsgevarar skulu síggja teg, mást tú skráseta eitt CV á starv.fo. Áðrenn tú kanst skráseta eitt CV, mást tú vera brúkari av starv.fo. Fyri at blíva brúkari skrásetir tú teg við navni, p-tali, brúkaranavni og loyniorði.







So kemur eitt oyðublað fram. Fyll tað út, og tú ert skrásett/ur sum brúkari. Vel tær eitt brúkaranavn og eitt loyniorð, sum er lætt at minnast. Á forsíðuni, niðast til høgru, eru tríggir teigar við størvum. Trýst teg inn í teigin "summarstarv" fyri at síggja hvørji eru leys.






# Starv.fo

## STARVSLÝSINGAR

Á starv.fo kanst tú síggja øll tøk størv. Hesi eru at finna á listum undir ymsum yvirskriftum. Trýstir tú teg inn á eitt ávíst starv, sært tú eina starvslýsing. Á vinstru síðu er eitt dømi um eina **summarstarvslýsing***.

### Hevur tú áhuga fyri starvinum

Um tú finnur eitt summarstarv, ið hevur tín áhuga, kanst tú trýsta á fyrsta teig í ovasta horni til høgru: **Áhuga**. Summarstarvið verður nú lagt í eina mappu fyri seg, so tú lættliga finnur tað aftur, um tú ætlar at søkja starvið. Minst til at fara inn á heimasíðuna javnan, tí har eru ofta nýggj størv at finna.




# Starv.fo

## CV

Á starv.fo kanst tú eisini stovna eitt **CV***. Við einum CV á heimasíðuni kanst tú síggja, um samsvar er millum summarstarvið og tínar førleikar og ynski. Eisini sær arbeiðsgevarin beinanvegin, um tú ert tann rætta ella rætti til starvið.
Far inn í teigin: **Skráset CV**

**Nú kanst tú skráseta:**

- ✓ Starvsroyndir
- ✓ Starvsynski
- ✓ Málkunnleika
- ✓ Koyrikort
- ✓ Teldukunnleika
- ✓ Samandráttur
- ✓ Lýsing
- ✓ Skeið
- ✓ Starvsøki
- ✓ Útbúgving

Tær tørvar ikki at fylla øll økini út beinanvegin. Tað ber altíð til at fara inn aftur og skriva meira um teg og tíni ynski seinni. Ivast tú í, hvat bólkarnir merkja, sært tú tað á heimasíðuni. Eisini sært tú eitt dømi um eitt CV á síðu 18.

Tú kanst eisini prenta CV'ið út, sum tú saman við eini umsókn kanst senda arbeiðsgevarinum.


Matstovan Jákupsskel
Jákup Simonsen
Háenni 24
700 Klaksvík

Lisa Joens
Kopargøta
700 Klaksvík
Tel 326508

27.05.2008

Hey Jákup

Eg eiti Lisa Joensen og eg eri 16 ár. Eg søki starvið sum kokkur, tí eg altíð havi droymt um at verði kokkur. Eg havi sera stóran áhuga fyri rávørum og at blanda tær saman til rættir. Harafturat havi eg nøkur vikuskifti arbeitt sum tænari í veitslum, og mær dámdi væl at bera inn, stákast í køkinum og at tosa við fólk. Eg eri fyrikomandi, vinarlig og áhugað í tænastu. Harafturat eri eg røkin og møti stundisliga. Vónandi fái eg frítíðarstarvið sum tænari og køkshjálpari hjá tykkum.

Bestu heilsanir

Lisa

Lisa Joensen

# UMSÓKN OG SAMRØÐA

## UMSÓKN

Tá tú hevur funnið summarstarvið á listanum, er klárt at søkja. Ert tú skrásett/ur á starv.fo, hevur tú møgleika at senda arbeiðsgevarinum ein teldupost umvegis starv.fo, tá tú hevur lagt starvslýsingina í Áhuga. Um tú ikki ert skrásett/ur á starv.fo, mást tú senda eina umsókn við postinum. Les starvslýsingina væl, áðrenn tú søkir, tí arbeiðsgevarin biður vanliga um okkurt serstakt.

**Hetta kann vera:**

- ✓ At tú dugir at samstarva
- ✓ Ert vinarlig/ur
- ✓ At tú torir at tosa í telefon.

Skriva nøkur orð um teg og um, hví tú søkir summarstarvið. Skriva rættan bústað og rætt telefonnummar. Á síðu 20 sært tú, hvussu ein umsókn kann vera. Lisa nevnir í umsókníni, at hon hevur stóran áhuga fyri mati, at hon hevur arbeitt sum tænari, og at hon er fyrikomandi, vinarlig og tænastusinnað.



# UMSÓKN OG SAMRØÐA

## SAMRØÐA

Ofta verður tú biðin um at koma til samrøðu um summarstarvið. Tað er gott at fyrireika okkurt at siga, áðrenn tú fert til samrøðuna.

**Vanliga fært tú spurningar, so sum:**

- ✓ Hví hevur tú søkt?
- ✓ Kanst tú greiða frá um teg?
- ✓ Hvørjar styrkir hevur tú?
- ✓ Hvørjar veikleikar hevur tú?

Arbeiðsgevarin metir, um tú ert egnað/ur til starvið. Men tá kann tað vera gott at hugsa um, at eisini tú skalt meta, um starvið er nakað fyri teg. Møt stundisliga og lat teg í hóskandi klæði. Um tú ivast í, hvat er hóskandi, spyr so onkran, sum tú heldur veit tað.




# RÆTTINDI, ARBEIÐSTÍÐIR OG LØN

## RÆTTINDI

Tá tú fert at summarstarvast, hevur tú nøkur rættindi. Tað eigur at vera greitt, hvat tú skalt gera, hvussu nógvar tímar, tú kanst vænta at arbeiða um vikuna/mánaðin, hvussu nógv tú skalt hava í løn osfr., so ongar misskiljingar eru millum arbeiðsgevaran og teg.

**Tað er av týdningi, at tú fært:**

### EIN SÁTTMÁLA

Ein sáttmáli er ein munnlig ella skrivlig avtala um arbeiðskor. Í einum sáttmála stendur, hvussu nógvar tímar tú arbeiðir, hvat tú gert, hvussu langa tíð, arbeiðið varir, og hvat tú skalt hava í løn.

framhald




# RÆTTINDI, ARBEIÐSTÍÐIR OG LØN

### LØNARSEÐIL HVØNN MÁNAÐ ELLA VIKU

Á einum lønarseðli sært tú, hvussu nógvar tímar, tú hevur arbeitt eitt ávíst tíðarskeið, og hvat lønin er. Hygg at, um tað, sum stendur á seðlinum, er rætt.

### FRÍTÍÐARLØN

Frítíðarløn er løn, sum verður flutt á tína kontu um 1. mai. Frítíðarlønin eigur at standa á lønarseðlinum.

### LÝSING AV STARVSUPPGÁVUM

Tað er av týdningi, at tú veitst, hvørjum uppgávum, tú kanst vænta at arbeiða við, og at arbeiðsgevarin heldur seg til hetta. Tað ber eisini til at avtala, at tú eisini skalt gera annað enn tað, sum stendur í lýsingini av arbeiðsuppgávum.



# RÆTTINDI, ARBEIÐSTÍÐIR OG LØN

## ARBEIÐSTÍÐIR OG LØN

Arbeiðstíðin er tímatalið, tú arbeiðir um vikuna ella mánaðin. Arbeiðir tú fulla tíð, er arbeiðstíðin 7-8 tímar um dagin. Um tú ert tímalønt/ur, verður lønin roknað fyri vikuna. Ert tú mánaðarlønt/ur, fært tú løn fyri ein mánað í senn. Upphæddin, ið fer inn á tína kontu, er treytað av:

- ✓ Um tú arbeiðir heil- ella parttíð
- ✓ Um starvið er mánaðar- ella tímalønt
- ✓ Hvat tímalønin ella mánaðarlønin er
- ✓ Hvussu nógvar tímar, tú arbeiðir
- ✓ Hvussu gomul/gamal tú ert



# SUMMARSTARV – FYRSTA STIG Á YRKISLEIÐINI

## SUMMARSTARV – VEGURIN UPP

Nakrir førleikar eru felags fyri flest øll størv. T.d. lærir tú gjøgnum summarstarvið at samstarva og at samskifta. Hóast starvið kanska vísir seg at vera keðiligt ella nakað annað enn tað, tú hevði væntað, kann tað vera stuttligt at royna. Tú hittir í øllum førum fólk og vinnur pening. Eisini brynjar tú teg við summarstarvinum til framtíðina.

**Tú fært starvsroyndir og møguleika at meta um:**

- ✓ Hvat tær dámar at gera
- ✓ Hvørja yrkisleið tú kundi hugsað tær at valt
- ✓ Ella ikki hevur hug til at ganga

**"Upp á bert 6 vikur fekk eg fantastiska nóg-var arbeiðsroyndir, og eg fann út av, at eg vil vera okkurt innan samskifti."**

SITAT: KARL SIMONSEN, 18 ÁR

**"Eg hitti nógv fitt fólk, og tað var stuttligt. Eisini var tað feitt at fáa pengar, meðan eg hugnaði mær"**

SITAT: PETUR BÆRENTSEN, 16 ÁR

**"Stjórin bjóðaði mær at halda fram eftir skúlatíð alt árið. Tað taki eg sum eitt herðaklapp. "**

SITAT: DØGG JOENSEN, 17 ÁR

**"At byrja við var eg nokkso nervøs. Men tað gekk skjótt yvir. Eg dugi nógv meira enn eg helt. Ein feit uppliving."**

SITAT: MARIANNA JENSEN, 15 ÁR

# SUMMARSTARV – FYRSTA STIG Á YRKISLEIÐINI

## UNG UM SUMMARSTØRV

Tað eru nógvir møguleikar í at velja hjá ungum, eitt nú við læruplássum, miðnámsskúlum, hægri lestri og arbeiði annars. Tí kann tað verða trupult at velja hvørja leið mann skal fara. Eitt summarstarv kann verða ein góður máti at royna ávís størv ella vinnur, og kann verða við at hjálpa tær at taka eina avgerð um tína yrkisleið.

Á síðu 32 sæst, hvat onnur ung hava fingið burtur úr teirra summarstørvum.







# GER TAÐ!

Sum heilt ung ímyndaði **Elin í Stórustovu** sær eina yrkisleið innan sálarfrøði, men tá hon fyri 10 árum síðani hoyrdi um nýstovnaðu útvarpsrásina Atlantic Radio, var hon ikki sein at bjóða seg fram. Hetta var akkurát nakað fyri 19 ára gomlu havnagentuna við huginum til ókendar avbjóðingar. Elin byrjaði beinanvegin á Atlantic Radio, bæði sum útvarpsvertur og við at selja lýsingar.

Seinni kom hon í Útvarp Føroya, har hon millum annað stóð fyri ungdómssendingini ZIP, sum hon sjálv hevði fingið hugskot til. Í dag arbeiðir Elin í Stórustovu sum vertur í sendingini Ctrl.E, ið er at hoyra hvønn gerandisdag í Kringvarpinum.

- Eg eri glað fyri, at eg ikki hugsaði so nógv, men bara kastaði meg út í tað ókenda. Hjá mær var Atlantic Radio óbeinleiðis leiðin til tað, eg geri nú. Og eg havi lært nógv av øllum teimum arbeiðunum, eg havi havt. Eingin orsøk er at ræðast tað ókenda. Tað er **bara at gera tað**! Sigur Elin í Stórustovu við ungfólk, sum vilja hava arbeiði í frítíðini.


Skimast eftir summarstarvinum
á www.starv.fo